# VÆLKOMIN Í 1. FLOKK

## Felagsinnskriving í Tórshavnar kommunalu skúlar, forskúla og frítíðarskúlar skúlaárið 2011/2012

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 2005 í 1. flokk í Tórshavnar kommunalu skúlar næsta skúlaár, verða biðin at siga frá mánadagin 24. ella týsdagin 25. januar 2011.

Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum, men um pláss ikki er fyri øllum teimum næmingum, sum búgva næst við ávísan skúla í kommununi, verður neyðugt at flyta næmingar í skúla, har pláss er.

Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fáa skúlarnir og foreldrini boð um, í hvønn skúla næmingar skulu koma í 1. flokk.

**FORSKÚLIN**
Foreldur ella verjar, ið ætla at skriva børn í forskúlan í Sankta Frans skúla, verða eisini biðin at siga frá mánadagin 24. ella týsdagin 25. januar 2011.

### Innskrivingin

**SKÚLARNIR Í HØVUÐSSTAÐARØKINUM**
Skúlin á Argjahamri, Venjingarskúlin, Tórshavnar Kommunuskúli, Sankta Frans skúli ( 1.fl. og forskúli ), Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt.

Innskrivingin er í býráðssalinum mánadagin 24. og týsdagin 25. januar, báðar dagarnar kl. 15.00-18.00.

Havið avrit av dóps-/navnabrævi við.

Eisini ber til at ringja í býráðssalin somu tíð á telefon 254010.

**SKÚLARNIR AÐRASTAÐNI ENN Í HØVUÐSSTAÐARØKINUM**

**KOLLAFJARÐAR SKÚLI** Innskrivingin í Kollafjarðar skúla verður í skúlanum týsdagin 25. januar, kl. 15.

**KALDBAKS SKÚLI** Innskrivingin í Kaldbaks skúla verður í skúlanum mánadagin 24. januar, kl. 11.30-12.30 ella á telefon 302520/515398.

**VELBASTAÐAR SKÚLI** Innskrivingin í Velbastaðar skúla verður í skúlanum týsdagin 25. januar, kl. 15-17 ella á telefon 302505/228607.

**NÓLSOYAR SKÚLI** Innskrivingin í Nólsoyar skúla verður í skúlanum týsdagin 25. januar, kl. 17.30-18.30 ella á telefon 302465/217001.

Havið avrit av dóps-/navnabrævi við.

**FRÍTÍÐARSKÚLIN**
Børn, ið skulu í frítíðarskúla, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum / skúlanum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til frítíðarskúlan í Snarskivuni, á heimasíðuni hjá kommununi www.torshavn.fo ella á telefon 302010.

Meiri fæst at vita um innskrivingina í skúlanum ella frá Mentamáladeildini, Katrini Ellingsgaard, málsviðgera í skúlamálum, telefon 302010/281123.

Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar
**MENTAMÁLADEILDIN**

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA




**Nú hevur tú møguleikan at ogna tær byggibúgvi vinnugrundstykki á Skarðshjalla.**

Sum framhald av útstykkingini á Sandvíkarhjalla, útstykkjar kommunan umleið 15.800 fermetrar til vinnugrundstykki á Skarðshjalla.

Grundstykkini eru ætlað til framleiðsluvinnu, byggivinnu, bilasølu, verkstaðir og líknandi vinnur, sum eru umhvørvisflokkaðar í flokki 3 til 6.

**STØDD AV GRUNDSTYKKJUM**
Støddin á grundstykkjunum verður millum umleið 800 og 1.800 fermetrar.

Grundstykkini verða útgrivin og grovplanerað, og verður fjarðhiti, vatn, kloakk og el lagt inná hvørt stykkið.

**Kostnaður**
Mettur fermeturprísur er. kr. 1.250,00

Helvtin av metta kostnaðinum, fellur til gjaldingar við undirritan av fyribilsskeyti, og restin fellur til gjaldingar, tá ið økið er liðugt byggibúgvið og grundstykkini eru matrikulerað.

**Tíðarætlan**
Fyrstu stykkini verða ætlandi byggibúgvin á heysti 2011.

**FLEIRI UPPLÝSINGAR**
Um tit vilja ogna tykkum eitt stykki, ella um tit hava spurningar í hesum sambandi, kunnu tit venda tykkum til løgdeildina á telefon 302010 ella senda okkum teldubræv á torshavn@torshavn.fo

Tað skal viðmerkjast, at nøkur av stykkjunum eru avløgd.

Sí annars meira á torshavn.fo.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA